# Setningsgreining

Tá ið vit greina setningar, býta vit setningin í ymiskar liðir, sum hvør hevur sín týdning í setninginum.
Liðirnir kunnu vera eitt ella fleiri orð, stundum eisini heilir setningar.
Hvør liður í setninginum hevur sítt tekn.

**Teknini, ið vit nýta, eru:**

| | |
|---|---|
| ○ | umsøgn |
| ○ ○ | javnskipað umsøgn |
| ○- -○ | samansett umsøgn |
| × | grundliður |
| ×̲ | fyribilsgrundliður og eykagrundliður |
| △a | ávirki í hvønnfalli |
| △d | ávirki í hvørjumfalli |
| △̄ | óbeinleiðis ávirki |
| △p | persónsávirki |
| ⊗ | umsagnarliður til grundlið |
| ◬ | umsagnarliður til ávirki |
| □_ | hjáliður |
| sb | sambinding |

# Setningsgreining – umsøgn

**Umsøgnin sigur okkum okkurt um grundliðin –**
**hvat ið hendir, hvat ið er, ella hvat ið onkur ger**.

Umsøgnin er <u>eitt</u> ella <u>fleiri</u> sagnorð.

**Dømi**: Jákup *fiskar*. Hon *situr* og *bindur*.

Finn **umsøgnina** í setningunum og set o undir.

| | | |
|---|---|---|
| Barnið svevur. | Omma bakar. | Hundurin goyr. |
| Hon flennir. | Glasið brotnaði. | Óli rópar. |
| Snigilin skríður. | Telefonin ringir. | Skiparin stýrir. |
| Hanus rennur. | Kaffið kólnar. | Abbi syngur. |

| | | |
|---|---|---|
| Barnið svevur og snorkar. | Omma bakar og murrar. | Hundurin goyr og ýlir. |
| Hon flennir og tárar. | Glasið koppaði og brotnaði. | Óli rópar og skeldar. |
| Snigilin skríður og etur. | Telefonin ringir og ringir. | Skiparin stýrir og trallar. |
| Hanus rennur og hoppar. | Kaffið stendur og kólnar. | Abbi syngur og dansar. |

! **Gev gætur!**
Tá ið *og* stendur ímillum tvey sagnorð, siga vit,
at umsøgnin er *javnskipað*.

# Setningsgreining – samansett umsøgn

Umsøgnin kann eisini vera *samansett* við tveimum ella fleiri sagnorðum.

**Dømi**:

Hon hevur verið í svimjihylinum.
○- -○

Hann átti at farið til handils.
○- -○

Óluva kann fara.
○- -○

Tekníni, ið vit nýta:

| | |
|---|---|
| ○ | umsøgn |
| ○ ○ | javnskipað umsøgn |
| ○- -○ | samansett umsøgn |
| × | grundliður |
| △ | ávirki |
| □_ | hjáliður |

Greina setningarnar.

**Í hesum kassanum er bara *samansett umsøgn*.**

| | | |
|---|---|---|
| Hon hevur verið úti. | Hevur tú sent brævið. | Tú átti at vitjað ommu. |
| Hetta fer at ganga. | Tú mást eta! | Hevur tú roknað í dag? |
| Eg havi gingið ein túr. | Tú kanst hjálpa. | Eg mundi dottið. |

**Í hesum kassanum er *umsøgn*, *javnskipað umsøgn* og *samansett umsøgn*.**

| | | |
|---|---|---|
| Vit sigla heim. | Eg fari at keypa. | Hann situr og prátar. |
| Eg havi droymt í nátt. | Sólin skínur. | Eg havi bakað. |
| Vit mugu fara. | Hann gongur og melur. | Áki og Tummas sparka. |
| Eg elski teg. | Hon vaskar og skúrar. | Vit hava svomið í dag. |

# Setningsgreining – grundliður

**Grundliður er tað orðið ella tey orðini í setninginum, sum talað er um**.

Grundliður kann t.d. vera eitt ella fleiri navnorð og fornøvn.

**Dømi**: *Báturin* siglir.
×

*<u>Abbin og hann</u>* fiska.
×

Finn **grundliðin** í setningunum og set × undir.

| | | |
|---|---|---|
| Barnið svevur. | Omma bakar. | Hundurin goyr. |
| Hon flennir. | Glasið brotnaði. | Óli rópar. |
| Snigilin skríður. | Telefonin ringir. | Skiparin stýrir. |

| | | |
|---|---|---|
| Barnið og mamman sova. | Omma og abbi baka. | Hundurin og kettan spæla. |
| Hon og hann flenna. | Glasið og krússið brotnaðu. | Óli og Símun rópa. |
| Snigilin og maðkurin skríða. | Telefonin og klokkan ringja. | Skiparin og kokkurin tralla. |

**Gev gætur!**
Grundliður kann bara standa í *hvørfalli*.

# Setningsgreining – eykagrundliður

*Eykagrundliður* verður settur í staðin fyri grundliðin, tá ið setningurin ongan grundlið hevur.

**Eykagrundliður er altíð orðið *tað*.**

**Dømi**: Tað regnar.
$\underline{\times}$ ○

Tað gongur væl.
$\underline{\times}$ ○ □_

Teknini, ið vit nýta:

| | |
|---|---|
| ○ | umsøgn |
| ○- -○ | samansett umsøgn |
| $\underline{\times}$ | eykagrundliður |
| ⊗ | umsagnarliður til grundlið |
| □_ | hjáliður |

Greina setningarnar.

| | | |
|---|---|---|
| Tað kavar. | Tað endaði væl. | Tað er stuttligt. |
| Tað verður gott. | Tað skýmir. | Tað ljóðar so. |
| Regnar tað? | Tað skal vera gott. | Tað kundi verið. |

# Setningsgreining – fyribilsgrundliður

Stundum finna vit ein **eykagrundlið**,
sum er *fyribilsgrundliður*;
rætti grundliðurin stendur tá seinni í setninginum.

**Dømi**: Tað er stuttligt, at tú komst.
⩡ ×

Tað ber til at gráta og flenna samstundis.
⩡ ×

Teknini, ið vit nýta:

| | |
|---|---|
| ○ | umsøgn |
| ○- -○ | samansett umsøgn |
| ⩡ | fyribilsgrundliður |
| × | grundliður |
| ⊗ | umsagnarliður til grundlið |
| □_ | hjáliður |

Greina setningarnar.

Tað er gott at vera ungur.

Tað verður keðiligt at fara.

Verður tað gott veður í morgin?

Tað er ikki lætt at floyta við mjøli í munninum.

Tað er mangur leikur í longum talvi.

Tað gongur ein seyður í garðinum.

Tað stendur ein gás í túninum.

Tað kann vera, at hon kemur.

Orð-Álvur

# Setningsgreining – umsøgn og grundliður

Finn **umsøgn** og **grundlið** í setningunum og set ○ og × undir.

Minst til, at umsøgnin og grundliðurin kunnu vera fleiri orð.

| | | |
|---|---|---|
| Gubbin flettir. | Anna klippir. | Jólini nærkast. |
| Blómurnar spretta. | Hurðin ríkir. | Áin rennur. |
| Toran gongur. | Lærarin roknar. | Tey spæla. |

| | | |
|---|---|---|
| Børnini klippa og líma. | Vespan flýgur og surrar. | Bára situr og lesur. |
| Øll rópa og geyla. | Tey mussast og klemmast. | Lambið dansar og hoppar. |
| Læknin hyggur og hugsar. | Pól liggur og svevur. | Fólk standa og flenna. |

| | | |
|---|---|---|
| Ása og Óli lesa. | Mamman og pápin dansa. | Steggin og bøgan gvagga. |
| Elin og hon keypa. | Sámal og Heri berjast. | Eplini og fiskurin kóka. |
| Sára og Sólvá ganga. | Kokkurin og tænarin skeldast. | Tú og eg líkjast. |

# Setningsgreining – ávirki

**Ávirki í einum setningi er tað, sum sagnorðið ávirkar ella ger okkurt við.**

**Dømi**: Hann lesur eina bók.
× ○ △

Í hesum døminum siga vit, at *eina bók* er ávirki.
Tað, sum verður lisið, er bókin.

Teknini, ið vit nýta:

○ umsøgn
× grundliður
△ ávirki

Finn **umsøgn**, **grundlið** og **ávirki** í setningunum og set teknini undir.

| | |
|---|---|
| Omman bakar eina kaku. | Abbi smíðar ein bát. |
| Hann fangaði ein krabba. | Teir spældu dyst. |
| Kórið murraði ein sang. | Hon skrivaði eina bók. |
| Maðurin seldi fiskin. | Pápin vaskaði bil. |
| Gubbin fletti veðrin. | Ingi roknaði stykkið. |
| Øll ótu ís. | Teir fingu løn. |
| Hann gjørdi døgurða. | Fríði málaði garðin. |
| Børnini slógu tunnu. | Hanna keypti eina blusu. |

# Setningsgreining
# – ávirki í hvønn- og hvørjumfalli

Ávirki kunnu standa í *hvønnfalli* og í *hvørjumfalli*.

**Dømi**: Hon seldi *bilin*. (hvønnfall)
× ○ △a

Vit spyrja: *Hvønn ella hvat seldi hon?*

Hann stýrdi *bilinum*. (hvørjumfall)
× ○ △d

Vit spyrja: *Hvørjum stýrdi hann?*

*Hvønnfall* eitur á latíni *akkusativ*.
Tí er teknið fyri hvønnfalsávirki △a.

*Hvørjumfall* eitur á latíni *dativ*.
Tí er teknið fyri hvørjumfalsávirki △d.

Greina setningarnar.

**Í hesum kassanum standa ávirkini í *hvønnfalli*.**

| | | |
|---|---|---|
| Teir spæla teldu. | Hann fiskar laks. | Annika teknar eina mynd. |
| Hundurin beit meg. | Tjóvurin stjól pengarnar. | Lív breyt armin. |

**Í hesum kassanum standa ávirkini í *hvørjumfalli*.**

| | | |
|---|---|---|
| Skiparin stýrir bátinum. | Hann slepti endanum. | Hann hjálpir gentuni. |
| Tey bjargaðu børnunum. | Hon møtti barninum. | Eg vaski mær. |

**Í hesum kassanum standa ávirkini bæði í *hvønnfalli* og í *hvørjumfalli*.**

| | | |
|---|---|---|
| Sjórænarin søkti skipið. | Hann kínir kettuni. | Hon sendi eitt bræv. |
| Hon loftaði bóltinum. | Tey fagna sumrinum. | Beiggin etur bomm. |

# Setningsgreining
# – umsagnarliður til grundlið

**Umsagnarliður til grundlið sigur okkum eitthvørt um grundliðin**.

Umsagnarliður til grundlið stendur altíð í *hvørfalli*.

**Dømi**: Hann er sjúkur.
× ○ ⊗

Hon eitur Ingibjørg.
× ○ ⊗

Tekniní, ið vit nýta:

| | |
|---|---|
| ○ | umsøgn |
| × | grundliður |
| ⊗ | umsagnarliður til grundlið |

Greina setningarnar.

| | |
|---|---|
| Eg eri ill. | Hann verður glaður. |
| Báturin eitur Sílið. | Hann kallast Ólavur. |
| Øll gjørdust vónbrotin. | Fuglurin er tikin. |
| Húsini eru málað. | Bilurin er grønur. |
| Hann bleiv kløkkur. | Bókin nevnist Lognbrá. |
| Hon tykist kedd. | Hetta er lívið! |

**Gev gætur!**
Ein hent regla er, at til ber at seta = millum grundliðin og umsagnarliðin til grundliðin.

# Setningsgreining – hjáliður

Hjáliðir lýsa:
*tíð, stað, orsøk, mát, hátt, meting, játtan og noktan.*

Teknið fyri hjálið er □__

**Dømi**: Hon fór í gjár.
□__

Greina setningarnar.

**Í hesum kassanum lýsa hjáliðirnir *tíð*.**

Tey fóru í gjár. Flogfarið lendir nú. Fyrradagin regnaði.

Vit koma í morgin. Eg vaknaði tíðliga. Eg sovnaði seint.

**Í hesum kassanum lýsa hjáliðirnir *stað*.**

Hann var í bátinum. Diddan lá í vøgguni. Vit gingu upp á tindin.

Vit eru heima. Bókin liggur á borðinum. Nógv fólk eru á ólavsøku.

**Í hesum kassanum lýsa hjáliðirnir *hátt*.**

Hann gekk seigliga. Maturin smakkar væl. Hann sang illa.

Hon tosar spakuliga. Hann spákaði róliga. Hann kom rennandi.

**Í hesum kassanum lýsa hjáliðirnir ymiskt.**

Fólkini runnu langt. Tú sleppur ikki! Ja, tú kanst fara.

Tíbetur fór hon. Vit spældu leingi. Hann fór í illsinni.

# Setningsgreining – persónsávirki

Summi sagnorð taka ikki grundlið.

Í staðin taka tey **persónsávirki** í **hvørjumfalli**.

**Dømi**:

**Mær** *dámar* væl ítrótt.
△p ○

**Tær** *nýtist* ikki at keypa mjólk.
△p ○

Teknini, ið vit nýta:

| | |
|---|---|
| ○ | umsøgn |
| × | grundliður |
| △ | ávirki |
| △p | persónsávirki |
| □_ | hjáliður |

Greina setningarnar.

| | |
|---|---|
| Mær dámar ræst kjøt. | Okkum tørvar turr klæði. |
| Teimum gongst væl. | Mær tykir synd í honum. |
| Teimum hóvar blómur. | Mær vantar innlit í málið. |
| Lambinum nýtist mjólk. | Fríðu dámar tónleik. |

**!**

**Gev gætur!**
Vit hava ofta lyndi til at halda, at persónsávirki er grundliður.
Men so er ikki, tí grundliður stendur altíð í hvørfalli,
*persónsávirki stendur ongantíð í hvørfalli*.

# Setningsgreining – óbeinleiðis ávirki

Ávirki eru *beinleiðis* ella *óbeinleiðis*.

**Beinleiðis ávirki verður beinleiðis stýrt av umsøgnini.**

**Dømi**: Drongurin gav henni gávuna.
× ○ ⧋ △a

Í hesum setningi er gávuna *beinleiðis ávirki* (△a),
meðan henni er *óbeinleiðis ávirki* (⧋).

Umsøgnin stýrir beinleiðis ávirki, sum í hesum føri er *gávan*.
Gávan er tað, sum verður givið.
Óbeinleiðis ávirki *henni* verður ikki stýrt av umsøgnini.
Hon verður ikki givin.

Teknini, ið vit nýta:

| | |
|---|---|
| ○ | umsøgn |
| × | grundliður |
| △a | beinleiðis ávirki í hvønnfalli. |
| △d | beinleiðis ávirki í hvørjumfalli |
| ⧋ | óbeinleiðis ávirki |

Greina setningarnar.

**Í hesum kassanum eru bæði *beinleiðis* og *óbeinleiðis ávirki*.**

Hann seldi mær bilin.

Hon gav mær ein lúsing.

Abbin sigur børnunum eina søgu.

Lærarin lærdi meg reglurnar.

Hann stýrir mær virkinum.

Hann beyð henni ein dans.

Kári vísti manninum húsið.

Tey sendu fólkunum heilsanir.

Hon fortelur øllum alt.

Ása rætti mær bókina.

Hon spyr meg spurningar.

Hon kastaði mær ein bólt.

# Setningsgreining
# – umsagnarliður til ávirki

**Sum heitið sigur, lýsir hesin umsagnarliður ávirkið.**

Umsagnarliður til ávirki stendur í sama falli sum ávirkið.

**Dømi**: Hann sá læraran illan.
× ○ △a ⊚

Tey kalla hana Lisu.
× ○ △a ⊚

Tekniní, ið vit nýta:

| | |
|---|---|
| ○ | umsøgn |
| × | grundliður |
| △ | ávirki |
| ⊚ | umsagnarliður til ávirki |

Greina setningarnar.

| | |
|---|---|
| Øll sóu meg illa. | Teir málaðu bátin grønan. |
| Teir gjørdu tarvin øran. | Jólini gera meg glaða. |
| Teir dømdu hann sekan. | Eg keypti vognin nýggjan. |
| Tey funnu rottuna deyða. | Malan skrivaði stílin lidnan. |
| Tær fingu hana glaða. | Teir settu hann fastan. |
| Teir nevndu hann Vensil. | Eg kendi meg vónsvikna. |

**Gev gætur!**
Ein hent regla er, at til ber at seta = millum ávirkið og umsagnarliðin til ávirkið.